# Heilsuskúli Føroya 800 Tvøroyri

Søkir eftir lærara á 3/4 tíð, 30 tímar um vikuna, at byrja 1. juli 2005.

Somuleiðis er eitt starv á fulla tíð, 40 tímar um vikuna, at byrja 1. oktober 2005.

Starvið umfatar undirvísing av heilsuhjálparanæmingum, fyrireiking og tilrættisleggjan í samband við undirvísing.

Tú skalt hava eina miðallanga framhaldsútbúgving, sum er viðkomandi fyri heilsuútbúgvingarnar t.d. sjúkrasystur, ergo- fysioterapeut, føðslu- og húsarhaldsfrøðingur e.l. Fyrimunur er, um tú hevur námsfrøðiliga eftirútbúgving ella aðra eftirútbúgving, skeið v.m.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og mennandi starv, har tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt í tínari undirvísing. Undirvísingin er løgd til rættis sum toymisarbeiði og sum verkætlanir, í tøttum tvørfakligum samstarvið ímillum lærarnar á skúlanum.

Undirvísingin tekur støði í 5 yrkislærugreinum, ið eru tann: handaliga, mentanarliga, virksemisskapandi, námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga, almanna/samfelagsliga og røktarliga yrkislærugreinin, við 20 % úr hvørjari grein.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til Susanne Høgh Olesen leiðara á skúlanum á tlf. 372 855.

Umsóknarfreistin er 29. juni 2005, og umsóknir skulu sendast til:

**Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya**
att: Súsanna Mortensen, vararektara,
Eirargarður 14 B,
FO-100 Tórshavn.

# Leiðari til Frítíðarskúlan í Vági

Søkt verður eftir leiðara til frítíðarskúlan hjá Vágs Kommunu.

**Stovnslýsing**
Frítíðarskúlin heldur til í Vágs Skúla

**Starvið**
Vit bjóða eitt starv við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har leiðarin millum annað kemur:

- At standa fyri tí umsitingarliga og námsfrøðiliga partinum viðvíkjandi stovninum.
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum.
- At leiðarin hevur eitt tætt samstarv við aðrar stovnar og umsitingina, hjá Vágs Kommunu

**Førleikakrøv**
Neyðugt er, at umsøkjarin hevur pedagogiska útbúgving, kann arbeiða sjálvstøðugt, er røkin og førur fyri at taka avgerðir í sínum arbeiði. Eisini er neyðugt at hava innlit í umsiting. Dentur verður lagdur á, at leiðarin kann skapa eitt gott samstarv millum stovnin, børn og foreldur.

**Setunarviðurskifti**
Starvið sum er 3/4 tíð er eitt fyribilsstarv, sum verður sett frá 15. august 2005 til 15. juni 2006. Løn sambært sáttmálanum millum Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya og Føroya Pedagogfelag ella við avvarðandi fakfelag.

**Meir fæst at vita**
um starvið við at venda sær til kommunuskrivstovuna tlf. 373024 (Petry).

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 4. juli 2005 kl. 12.00. Merk umsóknina "Leiðari".

**Vágs Kommuna**
Mentunarnevndin

# Heilsufrøðingur

Heilsufrøðiskipanin søkir eftir heilsufrøðingi til skipanina. Starvið verður við fyribils setan í økinum Streymoy/Vágar, men av tí at arbeitt verður við broytingum, kunnu flytingar fara fram, og eisini kunnu t.d. tveir heilsufrøðingar røkja starvið. Talan er um eitt starv við 40 tíma arbeiðsviku, 20 tímar á smábarnaøkinum og 20 tímar á skúlaøkinum. Starvið verður sett 1. september 2005 ella eftir avtalu.

Arbeiðið er samansett virksemi við tænastu til barnafamiljur og skúlar í økinum. Arbeiðið verður skipað m.a. við heimavitjan, ráðgeving, undirvísing og viðtalu. Stórur dentur verður lagdur á tvørfakligt samstarv.

**Vit kunnu bjóða:**
Sjálvstøðugt og spennandi arbeiði, men til tíðir krevjandi.
Fakliga menning og skipaða supervisión.
At vera partur av samstarvstoymi.
Væntast skulu broytingar í mun til raðfestingar og mannagongdir, í sambandi við menningarverkætlan.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum heilsufrøðingur.
Áhugi fyri fakligari menning. Arbeiðið er skipað í samstarvstoymi, og er tað tí ein fyritreyt, at viðkomandi hevur góð samstarvsevnir og kann viðvirka til at menna kollegiala samstarvið.

Løn sambært avtalu millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjartu Vilhelm, leiðara á Heilsufrøðiskipanini, tlf. 354010.

**Umsóknarfreistin er mánadagin 18. juli 2005.**
Umsókn við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til:

**Heilsufrøðiskipanin**
N. Finsensgøta 28
Postboks 132
110 Tórshavn

*Arbeiðið hjá heilsufrøðinginum er m.a. at eygleiða og kanna barnið, at ráðgeva/vegleiða foreldrum viðvíkjandi barnsins sálarligu, sosialu og likamligu menning, foreldraleikluti og tilknýti. Á skúlanum er arbeiðið, umframt hetta, at gera regluligar funktiónskanningar, samtala við børn, bæði persónligar, bólka-samrøður og undirvísing.*


SPEKT statsaut. revisorar

Correspondent Firm of KPMG International a Swiss Cooperative

# Summarfrí

Í døgunum frá 11. juli til 8. august 2005 er skrivstova okkara stongd vegna summarfrí.

Er átrokandi tørvur at fáa fatur á okkum kunnu tygum ringja til ein av niðanfyristandandi:

| | |
|---|---|
| Árna Ellefsen | 54 34 45 |
| Finnbjørn Zachariasen | 54 34 25 |
| Mirjam Haraldsen | 54 34 20 |
| Paula Ellefsen | 54 34 01 |
| Súna Schwartz Jacobsen | 21 34 02 |

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f. spekt@spekt.fo www.spekt.fo

Staravegur 17
Postboks 3258
FO-110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
Telefax 34 34 35

Heiðavegur 15
Postboks 190
FO-600 Saltangará
Telefon 474 474
Telefax 474 475


# Svimjihylurin

Í tíðarskeiðnum 27.06 - 07.08.2005
er Svimjihylurin opin soleiðis:

| | |
|---|---|
| Mánadag | kl. 19.00 - 20.00 Børn |
| | kl. 20.00 - 21.00 Vaksin |
| Onsdag | kl. 19.00 - 20.00 Børn |
| | kl. 20.00 - 21.00 Vaksin |
| Leygardag | kl. 15.00 - 17.00 Børn |
| | kl. 17.00 - 18.00 Vaksin |

Viku 32 (8/8-14/8) er stongt

Opið sum vanligt aftur Mánadagin 15/8-05

**Vágs Býráð**


# LINEDANCE

Nýtt skeið í linedance byrjar týsdagin 21. juni í Argja Róðrarfelag.

Hold 1: Týsdag kl. 17.30 - 19.30
Hold 2: Týsdag kl. 20.00 - 22.00

Kostnaður fyri alt skeiðið er kr. 200,-

Tilmelding er hjá Hildibjørg á tel 228317

Sosialurin 341800